## H1N1 hóttir búskapin

H1N1 breiðir seg við fullari ferð kring allan heimin, og hóast talan ikki er um nakran serliga stóran heilsuvanda, so inniber sjúkan millum annað, at miliónatals fólk verða sjúk. Hetta rakar sjálvandi framleiðsluvinnuna sum heild, men eisini ber óttin við sær, at fólk ferðast minni og tey eru minni á almennum støðum, har nógv fólk eru savnað. Fyri eitt land sum Bretland, sum er serliga meint rakt av H1N1, roknað fíggjarfrøðingarnir við, at arbeiðið við at endurreisa búskapin væl kann verða seinkað í eini tvey ár.



## Svart summar í Norðurlandahúsinum

Annan mánadag verður heimsfrumframsýning av filmsverkinum, Black Summer. Talan er um verk, sum eitt enskt filmslið tók upp í Føroyum í fjør summar, men har bert føroyskir leikarar eru við. Tað er nakað, sum ikki er hent, síðani spanski Miguel M. Hidalgo gjørdi filmarnar, Rannvá, Páll Fangi og Heystblómur her á landi í 70´unum. Fólkini handan films- og tónleikaverkið "Black Summer" kalla seg the Pony Tales. Talan er um samstarv millum tónleikaran og tónasmiðin Kristoffer Sonne og filmsleikstjóran Nadia Marquard Otzen. Tey er bæði donsk, men hava búð og virkað í London í fleiri ár.

# Eldfimt evni í tunlunum

**Fyri at sleppa undan lekum í undirsjóvartunlunum eru veggirnir innan fyri sproytibetongið klæddir við PE-skúmi, ið er sera eldfimt. Brunamyndugleikarnir í Noregi óttast. Føroysku undirsjóvartunlarnir eru klæddir við sama evni, men Petur Lava Olsen, deildarstjóri í Brunaumsjón Landsins heldur vandan fyri vanlukku her vera lítlan**

TUNLAR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað tók sína tíð, til Brunaumsjón Landsins vildi góðkenna Vágatunnilin.

Orsøkin var, at tunnilin var klæddur við tí eldfima PE-skúminum, og Brunaumsjón Landsins kravdi, at eitt tjúkt lag av betongi varð sproytað út yvir skúmið, og so varð gjørt.

Tá ið Norðoyatunnilin varð gjørdur, varð gjørt eftir somu krøvum, og eitt seks sentimetur tjúkt lag av betongi varð sproytað upp undir loftið.

Men seks sentimetur av sproytibetongi er ikki nóg gott, sigur brunastjóin í Tromsø, Nils Ove Sollid við NRK. Lagið skuldi verið átta sentimetur tjúkt, um hetta evnið endiliga skal brúkast, sigur hann.

Í Noregi eru 200 tunlar klæddir við PE-skúmi. Evnið er seinastu 11 árini tikin úr nøkrum tunlum.

### Tað sama í Føroyum

Veggirnir í okkara undirsjóvartunlum eru klæddir við sama evni, og eins og í Noregi er seks sentimetrar av sprotibetongi uttaná, og tað er gjørt fyri at sleppa undan, at vatn dryppar niður á koyribreytina.

- Vandin fyri, at vanlukka hendir er avmarkað í Føroyum, tí okkara tunlar eru ikki so langir. Men tað er greitt, at sproytivetongið heldur ikki til alt. Um eitt nú ein stórur bussur rennur inn í veggin, kann tað brotna, og so kemur eldur í, sigur Petur Lava Olsen, stjóri í deildarstjóri í Brunaumsjón Landsins.

Ein persónbilur, sum koyrir við nógvari ferð, kann eisini bróta hol á betongi, um hann rennur á.

- Sannlíkindini fyri, at slíkar vanlukkur henda, eru smá, men tær henda kortini, sigur Petur Lava Olsen.



*Føroysku undirsjóvartunlarnir eru eisini klæddir við PE-skúmi, ið norsku brunamyndurgleikarnir hava ilt eyga á*

### Aðrar loysnir

Nýggj evni at nýta í staðin fyri PE-skúm í tunlunum eru á veg. Eitt plastevni, sum verður framleitt í Sveis, varð roynt í Norðoyatunlinum, men tað var ikki brúkt kortini. Hetta evnið er væl dýrari enn PE-skúmið.

Petur Lava Olsen væntar ikki, at PE-skúmið fer at verða tikið úr føroysku tunlunum aftur, tí tað hevði verið eitt sera kostnaðarmikið arbeiði.

# Dýrari at búgva í eldrasambýli

**Samgongan arbeiðir við eini ætlan um at tey, sum búgva í eldrasambýlum, skulu av við alla pensónina eins og tey á røktarheimunum**

ELDRASAMBÝLI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Samgongan leitar við ljós og lykt eftir milliónum á fíggjarlógini.

Eitt uppskot í sonevnda kreppupakkanum er, at tað skal kosta meira at búgva í eldrasambýli.

Nú er munur á, hvat tað kostar at búgva á ellis- ella røktarheimi og at búgva í eldrasambýli.

Tey, sum eru á ellis- ella røktarheimi, lata alla sína pensjón inn og fáa 900 krónur í lummapengum um mánaðin.

Fólk, sum búgva í eldrasambýli, rinda væl minni. Tey gjalda 3454 krónur um mánaðin fyri kost og innivist, uttan mun hvørja pensjón tey hava. Restin av pensjónini er teirra.

Sosialurin hevur frætt, at ætlanin er at broyta skipanina, soleiðis at tey í sambýlunum skulu rinda fyri uppihald eftir somu skipan sum tey á røktarheimunum.

Tað fer at geva nakrar milliónir um árið til landskassan.

Hetta krevur lógarbroyting.

Tað hevur ikki eydnast at fáa nakað nærri at vita um ætlaðu broytingina, tí innihaldið í kreppupakkanum er framvegis loyniligt.

Jóannes Eidesgaard, landstýrismaður í fíggjarmálum vil einki siga um nakað í kreppupakkanum.

Fyrisitingin í Almannaráðnum kann einki siga, tí uppskotið er á politiskum støði.

Uppskotið er ikki sent til hoyringar nakrastaðni.

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almennamálum sigur seg einki vita um uppskotið.